## VEÐRIÐ




**Veðrið mikudagin**
Landnyrðingur, 6 m/s. Turrveður allan dagin, møguliga einstøk æl seinnapartin. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin**
Skýggjað, útnyrðingur 2 m/s. Turrveður allan dagin. Hitin um 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Skýggjað. Útsynningur, 5 m/s. Nakað av avfalli fyrrapartin og út á seinnapartin, men um kvøldið turt. Hitin millum 10 og 12 stig

**Veðrið leygardagin**
Skýggjað. Landsynningur millum 6 og 9 m/s. Turrveður. Hitin millum 11 og 12 stig

**Veðrið sunnudagin**
Skýggjað. Eystan, um 9 m/s. Fyrrapartin turt, men regn seinnapartin og um kvøldið. Hitin 12 stig.

# Klaksvíkar søga avdúkað

**Fyrsta bindið av Klaksvíkar søgu, sum Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, hevur skrivarð, verður løgd fram á hátíðarhaldi í býráðshøllini mikukvøldið klokkan 19.30**

Fyrsta bindið, ið er slakar 400 blaðsíður, er um fornar búsetingar millum Vág og Vík, um teir fimm býlingarnar í Bø, um Tingstaðin, um vinnu- og jarðarviðurskifti, um kirkjur og bønhús, hendingar úr søgn og søgu og tíðina frammanundan, at einahandilin varð avtikin í 1856.

Klaksvík var upprunaliga navnið á eini lítlari óbygdari vík vestarumegin vágna, men tá ið Kongaligi Einahandilin í 1838 setti úthandil á stovn við hesa víkina, fekk hon so stóran týdning fyri allar Norðuroyggjar, at navnið á víkini vann hevd sum felagsnavn fyri allar býlingarnar.

Tað var kortini ikki fyrr enn fyri góðum hundrað árum síðan, tá ið menningin tók dik á seg, og býlingarnir vuksu saman, at fólk av álvara fóru at nýta orðið Klaksvík um allar býlingarnar.

Fyrsta bind er um, hvussu samfelagið varð skipað, áðrenn búsetingin tók dik á seg og garðar og býlingar vuksu saman til eina bygd.

Á almennari samkomu, sum verður í býráðshøllini mikukvøld klokkan 19.30, verður fyrsta bindið handað borgarstjóranum Steinbjørn O. Jacobsen

Skráin fyri hátíðarhaldið sær soleiðis út:

1 - Borgarstjórin bjóðar vælkomin
2 - Sangur/spæl
3 - Jóannes Hansen geiður frá setninginum hjá ritstjørnini
4 - Jóan Pauli Joensen ummælir fyrsta bind av Klaksvíkar søgu
5 - Sangur/spæl
6 - Hans Andrias Sølvará greiður frá arbeiðinum at skriva bókina - og handar borgarstjóranum fyrsta eintakið
7 - Sangur/spæl
Kaffi og køkur

Í ritstjørnini sita Jóannes Hansen, rektari, Jógvan Ravnsfjall, savnsvørður, Kristinbjørg Høgnesen, søgufrøðingur, Anna Katrin Matras, fornfrøðingur og Dávur Winther, mentanarleiðari

-km




## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 16 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 995 hPa yvir Bretsku oyggjunum ferðast í ein landnyrðing, men eitt veikt hátrýst, ið strekkir seg frá Grønlandi til



Ísland flytur seg ikki. Eitt brúgvalag yvir Føroyum ferðast spakuliga í ein norðan og hvørvur so líðandi.

*(Kelda: yr.no)*

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/08 kl. $06^{00}$ – 04/08 $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/08 kl. $06^{00}$ – 04/08 $06^{00}$.
Avfallið higartil í august: 2 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

8. august Fyrra kvarter
10. august Mánin longst frá jørðini
16. august Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. aug. | 4:08 | 16:31 | 3:08 | 15:31 | 3:23 | 15:46 | 6:08 | 18:31 | 7:08 | 19:31 | 2:23 | 14:46 | 1:23 | 13:46 | 4:23 | 16:46 | 5:23 | 17:46 | 3:53 | 16:16 | 5:08 | 17:31 |
| 13. aug. | 4:54 | 17:16 | 3:54 | 16:16 | 4:09 | 16:31 | 6:54 | 19:16 | 7:54 | 20:16 | 3:09 | 15:31 | 2:09 | 14:31 | 5:09 | 17:31 | 6:09 | 18:31 | 4:39 | 17:01 | 5:54 | 18:16 |
| 14. aug. | 5:39 | 18:01 | 4:39 | 17:01 | 4:54 | 17:16 | 7:39 | 20:01 | 8:39 | 21:01 | 3:54 | 16:16 | 2:54 | 15:16 | 5:54 | 18:16 | 6:54 | 19:16 | 5:24 | 17:46 | 6:39 | 19:01 |
| 15. aug. | 6:19 | 18:40 | 5:19 | 17:40 | 5:34 | 17:55 | 8:19 | 20:40 | 9:19 | 21:40 | 4:34 | 16:55 | 3:34 | 15:55 | 6:34 | 18:55 | 7:34 | 19:55 | 6:04 | 18:25 | 7:19 | 19:40 |
| 16. aug. | 7:02 | 19:23 | 6:02 | 18:23 | 6:17 | 18:38 | 9:02 | 21:23 | 10:02 | 22:23 | 5:17 | 17:38 | 4:17 | 16:38 | 7:17 | 19:38 | 8:17 | 20:38 | 6:47 | 19:08 | 8:02 | 20:23 |